Annað árið á rað gjørdust bæði kvinnur og menn úr Vestmanna føroyameistarar. Sosialurin ynskir bæði leikarum, stuðlum og viðhaldsfólkum hjartaliga tillukku við FM-heitunum

Myndir: Álvur Haraldsen

VB-Stjørnan 15-26 (4-13):

Vónin um silvurið

Stjørnan hølvaði VB av, og í skrivandi løtu hava tær soleiðis framvegis eina vón um at fáa silvurmerkini til høldar

HONDBÓLTUR – KVINNUR

Jákup Mørk

VB og Stjørnan spældu leygardagin dystihn, sum í øllum førum kundi avgera bronsustríðið. Hetta um VB gjørdist vinnari av dystinum. Vann Stjørnan hinvegin, so tryggjaðu tær sær í øllum førum bronsuna, meðan avgerðin um silvurmerkini so mátti bíða til mánakvøldið, tá Neistin í útsetta dystinum fór á vitjan hjá StÍF.

Eingin forðing

Júst VB hevur fleiri ferðir í ár lagt fótonglar fyri Stjørnuna, og kvinnurnar úr Vági eru fremsta orsøkin til, at Stjørnan ikki longu hevur tryggjað sær silvurmerkini.

Hesa ferð var tó alla tíðina greitt, at tað skuldi gerast trupult hjá VB. Regina Radó, er kanska mest týðandi leikarin á liðnum, men reyða kortið, sum hon heldur býttisliga fekk ímóti VÍF kostaði henni hendan dystin.

Og tað var eisini skjótt greitt, at her ætlaði Stjørnan sær at vinna. Sum eitt skot løgdu tær frá, beint sum dysturin byrjaði, og tær helmaðu als ikki í fyrsta hálva tíman. Ferðr eftir varð VB verjan rend um koll, og og serstakliga vóru tað tær báðar útlendsku, Simona og Adrijana, sum skutu VB málið niður.

Í steðginum stóð soleiðis longu greitt, at her vendist ikki hjá VB, og tá eftir at Stjørnan fyrst hevði sett turboina til eina ferð afturat, so tóku tær sær meira av løttum seinastu løtuna. Sigurin var undir øllum umstøðum vísur, men hvat slag av heiðursmerkjum hetta skal bera við sær, er sum sagt ikki avgjørt í skrivandi løtu. Klaksvíkskvinnurnar mugu tí helst inn á Skála mánakvøldið, har tær síðani fáa handa merkini, sum svara til endastøðuna.

Halda á

Fyri bæði VB og Stjørnuni man tað annars kennast eitt sindur hugstoytt, at Neistin soleiðis hevur otað seg fram. Einki var at ivast í, at hesi bæði liðini saman við VÍF undan kappingini vórðu mett sum bestu boðini upp á bronsuna.

Bæði hava tey tó havt sínar marrur. Stjørnan í VB, sum hevur argað tær meira enn gott er, og VB í Kyndli, sum onkursvegna megnaði at basa VB, meðan tað ofta als ikki bar til móti liðum, sum á pappírinum vóru nógv veikari.

Einki er tó at ivast í, at bæði tvey fara at gera eina nýggja roynd komandi árið. Smalu hóparnir eru kanska størsta forðingin, men felags er tó, at tær, sum eru, hava sera góð hondbóltsevni, og tí er tað als ikki óhugsandi, at hesi bæði liðini eisini komandi árið vera við til at mynda føroyska hondbóltstindin.

Dysturin í tølum

VB-Stjørnan 15-26 (4-13)

Málskjúttar:

VB: Gabriella Fekete 5, Eyðbritt Krosslá 2, Margreth Augustinussen 2, Gurið Mortensen 2(1), Durita Rouch 2, Laila Jespersen 1, Sólrun Krosslá 1

Stjørnan: Simona Dziugyte 9(1), Andrijana Milodanovic 7(2), Joan M. Joensen 5, Bára Skaale 2, Beinta Klakstein 1, Davina Sundskarð 1, Anna Kristina Samson 1

Brotskøst: VB 4, Stjørnan 3

Útvísingar: VB 2, Stjørnan 1

Dómarar úr TB: Kári Niclasen & Birgir Dimon

Hondbóltsstøður

1. Deild kvinnur

		dystir	v - j - t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	VÍF	12	11 - 0 - 1	694	440	254	34
2	Stjørnan	12	7 - 1 - 4	585	495	90	24
3	Neistin	11	7 - 1 - 3	528	452	76	23
4	VB	12	7 - 1 - 4	559	571	-12	21
5	StÍF	11	4 - 0 - 7	449	542	-93	9
6	Kyndil	12	2 - 1 - 9	540	630	-90	8
7	Sóljan	12	1 - 0 - 11	444	669	-225	5

1. Deild menn

		dystir	v - j - t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	VÍF	12	10 - 0 - 2	722	609	113	31
2	Neistin	11	9 - 0 - 2	724	608	116	28
3	StÍF	11	9 - 0 - 2	649	610	39	24
4	Kyndil	12	5 - 1 - 6	566	639	-73	13
5	Tjaldur	12	4 - 0 - 8	632	691	-59	12
6	H71	12	0 - 3 - 9	670	741	-71	9
7	KÍF	12	1 - 2 - 9	632	697	-65	8

Máltindarnir

Kvinnur:

Asta Petrauskiene	Sóljan	201	(31)
Ioana Rápa	VÍF	188	(49)
Simona Dziugyte	Stjørnan	183	(52)
Lotte Sørensen	Kyndil	172	(71)
Gabriella Fekete	VB	140	(33)
Regina Radó	VB	122	(30)
Ileana Manulescu	StÍF	118	(19)
Annika Ljósstein	Kyndil	115	(16)
Sóley Mikkelsen	VÍF	112	(21)
Joan M. Joensen	Stjørnan	110	(11)
Katrin á Neystabø	Neistin	110	(41)
Alina Olaru	StÍF	105	(10)
Nicoleta Radu	VÍF	98	(1)
Anna K. Samson	Stjørnan	97	(1)
Andrijana Milodanovic	Stjørnan	96	(17)

Menn:

Bjarni Wardum	H71	178	(35)
Heini Joensen	Neistin	176	(51)
Jacob Jónsson	Neistin	153	(17)
Høgni Klein	Kyndil	150	(15)
Sámal Joensen	VÍF	144	(32)
Dragisa Stojovic	Tjaldur	135	
Costin Dumitrescu	StÍF	134	(39)
Halgir Dahl Olesen	H71	132	(12)
Sverri Justinussen	Tjaldur	129	(17)
Durica Tomic	KÍF	127	(42)
Ingi Olsen	VÍF	126	(13)
Artur Johansen	StÍF	124	(15)
Finnur Hansson	H71	123	(23)
Áki Olsen	VÍF	117	(13)
Mortan Hansen	Tjaldur	110	(20)

Páskabuffét

1. & 2. páskadag

... fesk súpan við breyði
... lambasteik & oksasteik við grønmeti, reyttkáli og sós av soðnum
... íslagkøka

kr. **135,-** fyri hvønn - børn undir 12 ár ½ prís.

Hotel Tórshavnar Sjómansheim
Tórsgøta 4 Boks 97 110 Tórshavn
tel 35 00 00 fax 35 00 01
hotel@post.olivant.fo www.hotel.fo

HOTEL Tórshavnar Sjómansheim TORSHAVN ★★★

tel. 470000

PÁSKATILBOÐ

SKUNDA TÆR OG GER KVETTIÐ - AVMARKAÐ NØGD!

VOSS KOMFÝRUR
ELK 850 • Glaskeramikk • Yvirpláta: VOSS HE-system (skjótt upphiting og lág orkunýtlsa), 2 x 14,5 cm kokiokir, 2 x 18 cm kokiokir, Resthitaindikator á øllum plátum • Ovnur: VOSS Multiovnur við 3-Plus hitaluftssystem (200°C uppá 7 min.), sjálvreinsandi ovnur (58 litrar), toppljós í ovnrúminum, barnatryggja, stór skuffa við rullu/gliðuhjól
Vanl. prísur: 9950,-

8950,00 Spar 1000,-

5950,00 Spar 1250,-

7790,00 Spar 1110,-

Husqvarna
KOMFÝRUR
Regina Pub 70 - QSG 652 • Yvirpláta úr keramik glasi við 4 kokiokjum • Stórur rúmligur ovnur sum tekur 55 litra • 3-í-1 ovnur (varmluft, yvir/undirhita og grill) • Emalju á báðum síðum, bakveggi og lofti • Optimal barnasikring • Hædd 90,0 - 85,0 cm, • Breidd 59,6 cm • Vanl. prísur: 8900,-

ZANUSSI KOMFÝRUR
ZCC 6637 W • EL-komfýrur við glaskeramikkplátu • 2 dupult kokiokir • Yvir/undirhita, varmluft og grill • Clear'n Clean emalja í ovnínum •
Vanl. prísur: 7200,-

ELDING
SMS - Tel 319697 • Saltangará - Tel 449697 • Klaksvík - Tel 479697

Føroya Handilsskúli søkir eftir

LÆRARUM og TÍMALÆRARUM

frá 1. august 2002 ella eftir nærri avtalu. Hevur umsøkjari útbúgving í lærugreinum, sum nøkta tørv skúlans, kann talan verða um fast starv.

Tórshavn

FHS:
Virkisbúskapur á C-stigi (4 t/v), Týskt á stigi E/C (4 t/v), Fiskivinna (4 t/v), Marknaðarførsla (4 t/v), Samfelagslæru (4 t/v), Støddfrøði D/C (10 t/v), Kunningartøkni (4 t/v), Dekoratión (3 t/v), Spanskt (4 t/v) og Føroyskt (16 t/v).

HH:
Føroyskt (8 t/v), Sølubúskapur (4 t/v), Støddfrøði (5 t/v), Samtíðarsøga (8 t/v), Altjóða búskapur (5-10 t/v), Danskt (15 t/v) Vinnulívsrættur (9 t/v), Sálarfrøði (4 t/v), Týskt (4 t/v).

Kambsdalur

FHS:
Enskt C (8 t/v), Kunningartøkni C (8 t/v), Virkisbúskapur C (8 t/v), Marknaðarførsla C (12 t/v), Týskt grund (4 t/v), Týskt C (4 t/v), Støddfrøði grund (4 t/v), Støddfrøði C (5 t/v), Spanskt grund (4 t/v), Dekoratión grund (3 t/v).

HH:
Føroyskt A (8 t/v), Danskt A (6 t/v), Kunningartøkni A/B (10 t/v), Virkisbúskapar B (10 t/v), Støddfrøði B (5 t/v), Støddfrøði B (5 t/v)Spanskt C (2-4 t/v), Fjølmiðlakunnleiki C (4 t/v), Sálarfrøði C (4 t/v), Samtíðarsøga C (8 t/v), Multimediedesign B (4 t/v), Mentanarfatan C (4 t/v), Vinnulívsrættur C (6 t/v)

Førleikakrøv:
Prógv frá handilsháskúla, lærdum háskúla, handilsfaklæraraprógv ella onnur við øðrum fortreytum. Umsøkjarar við vinnuroyndum hava fyrimun.

Setanarkor til fast starv:
Fyrstu 2 árini verða roknað sum royndartíð. Tann, sum settur verður í fast starv, má vera til reiðar skjótast gjørligt at fara undir kravda námsfroðilga útbúgving. Lærarar, sum settir verða í fast starv, mugu rokna við í ávísan mun at skula undirvísa á fleiri stigum og partvís um kvøldið gerst tað neyðugt.

Løn:
Í lønarrensli 13/21/24, 18/26/29, 16/21/29/31 hjá HL ella eftir avtalu.

Leyst at søkja:
25. mars 2002. Galdandi til 10. apríl 2002.
Umsóknin skal sendast skúlanum, sum umsøkjarin ætlar at starvast

Umsókn fast starv:
Umsókn við ljósprentum av prívskjølum o.ø., skulu stílast til Føroya Handilsskúla, stýrið og sendast antin til Føroya Handilsskúla í Tórshavn, Marknagilsvegur 77, Postsmoga 177 ella Føroya Handilsskúla á Kambsdali 530 Fuglafjørður og verða skúlanum í hendi 10. apríl 2002. Umsóknarblað fæst á skúlanum.

Umsókn tímalærari:
Umsókn við ljósprentum av prívskjølum o.ø., skulu stílast til Føroya Handilsskúla, stýrið og sendast antin til Føroya Handilsskúla í Tórshavn, Marknagilsvegur 77, Postsmoga 177 ella Føroya Handilsskúla á Kambsdali 530 Fuglafjørður og verða skúlanum í hendi 10. apríl 2002. Umsóknarblað fæst á skúlanum.

Á Føroya Handilsskúla fevnir frálæran um FHS-stoðisár, Hægri Handilsskúla, stakroyndir, Merkonom, Datanom, Teldustoðingaútbúgving, HD 1. part, peningastovnaskúli og útboðin/umbiðin skeið.

FØROYA HANDILSSKÚLI